


www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 01 - 2013

# 27 oljukeldur í Norðsjónum stongdar

Ein oljuleki á einum oljupalli í Norðsjónum var fyrr í dag orsøkin til, at framleiðslan frá ikki færri enn 27 oljukeldum í bretska partinum av Norðsjónum varð steðgað. Oljulekin umborð á Cormorant Alpha framleiðslupallinum 100 fjórðingar norðan og eystan fyri Hetland hevði við sær, at tann týðandi Brent rørleiðingin varð stongd. Hon hevur alstóran týdning fyri flutningin av olju frá mongum av pallunum til lands. Pallarnir, sum hava verið noyddir at steðga framleiðsluni, standa fyri umleið 10% av allari oljuframleiðslu í bretskum øki. Hetta kostar oljufeløgunum 60 mill. kr. um dagin. Lekin umborð á pallinum varð uppdagaður mánadagin, tá fleiri av manningini vórðu fluttir til lands. Fyritøðufelagið sigur, at eingin olja er likin í havið, og at tamarhald er á støðuni. Nú verður kannað, hvør orsøkin er til lekan. Øll hugsandi trygdartiltøk eru sett í verk, meðan teknikarar royna at finna orsøkina til lekan. Eisini skotska stjórnin fylgir gongdini, sum kann fáa avleiðingar, fer framleiðslan ikki skjótt í gongd aftur. Hon kann eisini ávirka oljuprísin, nú nettupp Brentøkið hevur týdning fyri ásetanina av oljuprísinum. Mynd Cormorant pallurin eystan fyri Hetland